Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almannamálum

Evni: Mannagongdir innan almannaøkið

Spurningar:

1. Hvørji ítøkilig átøk eru gjørd í tíðarskeiðnum 2019-2022 fyri at betra um mannagongdir og annað innan almannaøkið til frama fyri brúkarar og fyri at tálma óneyðugum útreiðslum?
2. Hvørji ítøkilig átøk eru gjørd í 2023 fyri at betra um mannagongdir og annað innan almannaøkið til frama fyri brúkarar og fyri at tálma óneyðugum útreiðslum?
3. Hvørji ítøkilig átøk er ætlan um at gera í framtíðini fyri at betra um mannagongdir og annað innan almannaøkið til frama fyri brúkarar og fyri at tálma óneyðugum útreiðslum?

Viðmerkingar:
Tænastur og skipanir innan almannaøkið eru tíbetur øktar og mentar seinastu nógvu árini, so vit í dag í størri mun enn áður hava møguleika at lofta teimum borgarum, sum á ymiskan hátt hava ein tørv, sum vit sum samfelag halda vera rætt, at vit skulu lyfta saman.
Tó er og verður eisini ofta ført fram, at hetta hevur ein størri kostnað við sær, enn vit sum samfelag megna at bera, samstundis sum nevnt verður, at tað er neyðugt at gera átøk fyri at betra um mannagongdir, so tær hóska seg til tørvin, samfelagið og langtíðarhaldføri.
Tí hesir spurningar um gongdina seinastu árini, gjørdar ætlanir síðan seinasta løgtingsval og hvørjar ætlanir eru fyri framtíðina.

Á Løgtingi, 03. august 2023

Eirikur í Jákupsstovu